# SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ DALAVEGIN, MATR. NR. 804a, TÓRSHAVN

**SB_Tórshavn_Dalavegur_2019_3_2020**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 804a, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðabygging á økinum, samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini skal brúkast bústaðir.

Stk. 3. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4 Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtyktini, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til bústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið er flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokkin fyri vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 11. desember 2014, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk. 2. Økið hevur íbúðarbygging, fríøki, felags parkeringspláss og felags reinsiverk, samsvarandi kortskjali 2.

## §4 VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggistigið má ikki verða hægri enn 0,3.

Stk. 2. Nýtslustigið má ikki verða hægri enn 0,7.

Stk. 3. Útveggir A mugu ikki verða hægri enn 6 m.
Útveggir B mugu ikki verða hægri enn 7,5 m.
Útveggir C mugu ikki verða hægri enn 3,5 m.
Útveggir D mugu ikki verða hægri enn 4,5 m
Mønur X mugu ikki verða hægri enn 9 m.
Mønur Y mugu ikki verða hægri enn 6 m.

Sí viðhefta kortskjal 3 fyri nærri frágreiðing.

Stk. 4. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 20/00229 |
| Ætlanarskriv: | 25/6-2020 |
| Góðkent: | 26/6-2020 |
| Váttað: | [signature] |




| | |
|---|---|
| | **Tórshavnar Kommuna** **Býarskipanardeildin** |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 795l og 804a, Tórshavn |
| **Undirheiti** | Yvirlit |
| **Tekning nr.** | 1 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | 25.06.2020 | **Mát** | 1:3.000 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 795l og 804a, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Skipan | | | | |
| **Tekning nr.** | 2 | | | | |
| **Dagur** | 25.06.2020 | **Mát** | 1:1.000 | **Tekna** | RVH |




- Útveggur A - í mesta lagi 6 m
- Útveggur B - í mesta lagi 7,5 m
- Útveggur C - í mesta lagi 3,5 m
- Útveggur D - í mesta lagi 4,5 m
- Møna X - í mesta lagi 9 m
- Møna Y - í mesta lagi 6 m

**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 795l og 804a, Tórshavn |
| **Undirheiti** | Mest loyvdu hæddir |
| **Tekning nr.** | 3 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | 25.06.2020 | **Mát** | 1:1.000 | **Tekna** | RVH |

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Vaglið 2 - Postboks 32
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 26. juni 2020
J.nr.: 20/00229-8
At tilskila í svari
Viðgjørt: khp
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna í skrivi dagfestum 1. apríl 2020 sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til nýggja serstaka byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 7951 og 804a (nú bert matr. nr. 804a) til góðkenningar.

Uppskotið snýr seg um at skipa íbúðarbygging í økinum. Ætlanin er at byggja 6 býlingar við 6 íbúðum í hvørjum býlingi.

Broytingin hevur ligið frammi frá 6. februar til 19. mars 2020. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 19. mars 2020, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum dagfestum 18. juni 2020 til at góðkenna serstøku byggisamtyktina við Dalavegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn.

Hjálagt byggisamtyktartekstur við átekning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Jónas Tór Næs
løgfrøðingur